# Útbjóðing
# av
# ráðgeving í sambandi við sølu av P/f Postverk Føroya

*Føroya Løgting samtykti 19. desember 2018 at heimila landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum at selja partapeningin í P/f Postverk Føroya. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur í sambandi við søluna tørv á einum ráðgeva at standa fyri søluni.*

**Hetta bjóðar Uttanríkis- og vinnumálaráðið út**

Uppgávan, sum Uttanríkis- og vinnumálaráðið bjóðar út, snýr seg í stuttum um ráðgeving og tilgongdarstýring í sambandi við søluna av P/f Postverk Føroya. Søluráðgevin skal í samstarvi við Uttanríkis- og vinnumálaráðið fyrireika og standa fyri tilgongdini at selja partapeningin í P/f Postverk Føroya.

Uppgávan snýr seg um ráðgeving í sambandi við søluna:

- Yvirskipað projektleiðsla og samskipan
- Gera Information Memorandum at flýggja møguligum keyparum, undir hesum eisini virðismeting av fyritøkuni
- Kortleggja potentiellar keyparar og greina strategisk atlit
- Fyriskipa sjálva søluna – skipa útboð og dáturúm og tryggja eina væleydnaða sølutilgongd
- Samskifta við møguligar keyparar, gera trúnaðaravtalur (NDA's), fyriskipa sølufundir
- Fyriskipa samráðingar við møguligar keyparar
- Fyrireika søluavtalu
- Fyrireika Due Diligence & Closing
- Aðrar uppgávur í sambandi við søluna

Umframt søluráðgeving snýr uppgávan seg eisini um løgfrøðiliga ráðgeving, eitt nú at fyriskipa søluavtalu, undir hesum ráðgeving í sambandi við veitingarskylduna, fastogn og leigusáttmála v.m. Til ber ikki at bjóða upp á partar av uppgávuni, men tann, ið bjóðar, kann bjóða í felag við onnur, ella gera avtalur við undirveitarar.

**Lýsing av tilgongd og skipan**

Tilgongdin at einskilja P/F Postverk Føroya verður fyrireikað og skipað eftir leiðreglunum hjá Føroya landsstýri - *Leiðreglur um at einskilja fyritøkur landsins*. Víst verður til leiðreglurnar til nærri kunning um skipan og tilgongd.

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum hevur sett ein arbeiðsbólk við umboðum fyri ráðið, Løgmansskrivstovuna, Posteftirlitið og Posta at fyrireika og fremja søluna. Søluráðgevin hevur tilvísing til arbeiðsbólkin.

**Veitingarskyldan**

P/F Postverk Føroya skal eisini eftir søluna tryggja postflutning frá sendarum uttanlands til móttakarar í Føroyum og frá sendarum í Føroyum til móttakarar í útlondum. Í konsessiónini eru ásettar treytir viðvíkjandi útbering, kunning um almennar viðskiftatreytir, ársfrágreiðing, loyvisgjald o.a. Konsessiónin og treytirnar í hesari fylgja við í søluni í minsta lagi í 10 ár, eins leingi og loyvi er givið at framleiða frímerki.

Í sambandi við søluna er tí krav, at felagið, ið keypir P/F Postverk Føroya, bindur seg til at tryggja, at hesin postflutningur framhaldandi verður røktur. Partur av uppgávuni hjá søluráðgevanum er sostatt, at sølusáttmálin tryggjar, at keypari røkir veitingarskylduna til fulnar í minsta lagi í 10 ár.

**Fastognir**

Posta eigur ognina matr. nr. 1321b, Óðinshædd 2, Tórshavn. Uttanríkis- og vinnumálaráðið ynskir, at møguleiki verður at keypa Posta við ella uttan nevndu ogn. Verður Posta selt uttan matr. nr. 1321b, verður matr. nr. 1321b lagt í eitt kapitalfelag fyri seg, og leigusáttmáli gjørdur millum Posta og nevnda kapitalfelag.

**Uppgávustødd og tíðarhorisontur**

Ráðgevaraarbeiðið skal byrja í mai 2019 og skal vera avgreitt skjótast gjørligt. Kravt verður tí, at veitari hevur neyðuga orku til taks.

Ávíst tilfar at nýta í sølutilgongdini er longu framleitt. Partur av tilfarinum er av almennum slag og partur er trúnaðartilfar. Tilboðsgevi, ið uppfyllir minstukrøvini, kann seta seg í samband við Uttanríkis- og vinnumálaráðið at fáa almenna tilfarið, og eitt yvirlit, sum lýsir trúnaðartilfarið, útflýggjað.

Trúnaðartilfarið verður tøkt at brúka hjá tí sum fær ráðgevarauppgávuna.

**Krøv og upplýsingar annars**

Uttanríkis- og vinnumálaráðið krevur, at ráðgevin í ella saman við tilboðnum gevur eina gjølliga lýsing av, hvussu ætlanin er at skipa arbeiðið. Tilfar, sum verður framleitt, skal vera á føroyskum. Kravt verður, at tíðarætlanir verða gjørdar fyri, nær og hvussu hvørji stig í tilgongdini skulu fremjast í verki. Veitarin skal hartil gera uppskot um, hvussu uppgávan kann býtast sundur í smærri partar, so at Uttanríkis- og vinnumálaráðið fær eitt yvirlit yvir, nær ymsu partarnir skulu vera lidnir. Hetta skal eisini nýtast sum gjaldsætlan.

**Minstukrøv til fyritøkur, ið vilja geva tilboð**

Talan er um sera týdningarmikið arbeiði, og tí setir UVMR faklig krøv til veitarar, sum vilja geva tilboð. Minstukrøvini til fyritøkurnar eru, at tær:

- hava førleikar og royndir í at fyriskipa sølu av fyritøkum ella líknandi førleikar og royndir
- hava førleika og royndir at veita løgfrøðiliga ráðgeving og løgfrøðiliga tænastu í sambandi við søluna

Veitari kann eisini tryggja, at partur av uppgávuni verður veittur av samstarvsfelaga.

Veitarar, ið lata inn tilboð, skulu lata Uttanríkis- og vinnumálaráðnum yvirlit yvir teir persónar, sum ráðgevin ætlar at knýta at uppgávuni, og skjøl og tilvísingar, ið prógva, at teir lúka nevndu krøv.

**Vekting**

Arbeiðsbólkurin viðger og samanber tilboðini. Niðurstøðan um, hvørjum tilboði, ið tikið verður av, verður grundað á heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum nevnd eru í hesum skrivi. Uttanríkis- og vinnumálaráðið skilar sær rætt til ikki at velja nakað av innkomnu tilboðunum, t.d. um mett verður, at einki teirra lýkur krøvini.

| **Krav** | **Vekt** |
|---|---|
| Samlaður kostnaður | 50 % |
| Tilgongd, førleikar og annað | 50 % |

Í tann mun at kostnaðurin er ymiskur, alt eftir um matr. nr. 1321b verður við í søluni ella ikki, skulu samsýningarleistur og upphædd tilskilast fyri hvørt alternativið.

Møgulig ávegisgjøld skulu tilskilast, undir hesum hvørjir varðar á vegnum útloysa ávegisgjøld.

Um møgulig útlegg koma afturat upphæddini, skal tilskilast hvørji útlegg talan kann vera um og væntaðu upphæddirnar.

Í "Tilgongd, førleikar og annað" verða hesi viðurskifti tikin við í metingina:

- Lýsing av sølutilgongdini
- Lýsing av arbeiðsskipan og amboðum
- Tíðarætlan og meting av starvsfólkaorku
- Royndir við sølu av fyritøkum o.tíl.

Somuleiðis verður víst til minstukrøvini, sum nevnd eru omanfyri. Lýkur veitari ikki hesi krøv, verður tilboð hansara ikki viðgjørt.

**Freistir**

| **Freist** | **Hending** | **Viðmerking** |
|---|---|---|
| 12. apríl | | Útbjóðingin verður kunngjørd á Keypsportalinum |
| 12. til 25. apríl | Spurningar og svar | Spurningar skulu vera skrivligir og skulu sendast til Uttanríkis- og vinnumálaráðið á uvmr@uvmr.fo, viðmerk |

| | | |
|---|---|---|
| | | ”Posta spurningar”. Teir verða svaraðir í seinasta lagi 1. mai. |
| 6. mai kl. 12.00 | Tilboð skulu vera innlatin | Freistin at lata inn tilboð er 6. mai 2019 kl. 12.00. Tilboð, ið verða móttikin eftir freistina, verða ikki viðgjørd. Tilboð skulu sendast við telduposti til Uttanríkis- og vinnumálaráðið á uvmr@uvmr.fo, viðmerk ”Posta tilboð”. |
| 7. til 13. mai | Tilboð verða viðgjørd | Uttanríkis- og vinnumálaráðið skilar sær rætt til at biðja tilboðsgeva koma á fund, áðr-enn endalig støða verður tikin. |
| 14. mai | Vinnarin verður kunngjørdur | Vinnarin av útbjóðingini verður kunngjørdur á Keyps-portalinum, so skjótt sum avgerðin er fallin. Væntandi verður hetta um 14. mai. |